## Pál á Summar Festivali



Føroyska svimjihetjan, Pál Joensen, er í hesum døgum á Summar Festivali í Klaksvík. Saman við gentu síni, Maluni Vitalis Bærentsen, fór hann í gjár til Klaksvíkar at hugna sær nakrar dagar. Tey bæði búgva hjá formanninum í Svimjisambandi Føroya, Palla Ziskason. Pál segði, at hann ikki fór á Summar Festival fyri at lurta eftir nøkrum einstøkum orkestri, men nevndi tó, at hann gleddi seg at hoyra Smokie. Annars er ætlanin hjá honum nú at slappa av í einar tvær vikur, áðrenn venjingin fram móti EM-kappingini á stuttbana í desember, verður uppaftur tikin.

## 7000 fólk á festivali hóskvøldið

Summar Festivalurin byrjaði við einum braki hóskvøldið, og fyrireikararnir rokna við nógvum fólki bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið. Summar Festivalurin fekk eina sera góða byrjan hóskvøldið. Veðrið var av tí besta, og umleið 7.000 fólk vóru á festivalinum hetta fyrsta kvøldið. - Hetta var ein framúr góð byrjan. Vit eru næstan ovfarin av stóru undirtøkuni, og vit fegnast um, at alt gekk upp á stás. Tað vóru fleiri frálíkar framførslur, tøknin riggaði væl, veðrið var gott, og fólk í øllum aldri hugnaðu sær á festivaløkinum, sigur Steintór Rasmussen, fyrireikari.

# Festivalur eisini pengamaskina

**Summar Festivalurin hevur júst handað inn roknskapin fyri 2006 og 2007, og tølini vísa, at Festivalurin gevur avlop og hevur rímiligan likviditet**

VINNA
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*Summar Festivalurin 2008 sær ikki út til at verða minni enn teir undanfarnu, og stjórin, Steintór Rasmussen, gleðist um, at ikki bara áskoðarnir men eisini kreditorarnir hava álit á festivalinum*

Summar Festivalurin í ár er størri enn nakrantíð og longu hóskvøldið vóru yvir 7.000 fólk savnaði á Vágbøi at lurta eftir bretska bólkinum, Smokie. Størsti føroyski festivalurin er ikki bara eitt stórt mentanartiltak, men eisini eitt vinnuligt átak.

Sum øllum kunnugt fór hin stóri festivalurin í Føroyum, G! Festivalurin av knóranum, tí hóast stóra undirtøku og spennandi nøvn, hekk festivalurin ikki fíggjarliga saman.

Summar Festivalurin hevur júst handað inn roknskap, og hesin vísir eitt yvirskot. Men roknskapurin avdúkar einki um, hvussu partafelagið handan Summar Festivalin fær inntøkur og útreiðslur at ganga upp, tí roknskapurin vísir bara bruttoúrslitið.

Summar Festivalurin varð í 2006 gjørt til eitt smápartafelag, og fyrsti roknskapurin hjá felagnum varð innlatin 31. Juli í ár. Sosialurin hevur fingið innlit í roknskapin frá Skráseting Føroya.

### Lítið sigandi tøl

Blaðstjórin á Norðlýsinum, Olivur Joensen, hugleiddi í Degi og Viku, hóskvøldið um tann búskaparliga týdning, sum Summar Festivalurin hevur fyri Klaksvík og Norðoyggjar.

Hann gitti, at festivalurin hevur ein umsetning sum liggur um átta – tíggju milliónir, og festivalurin kastar einar 40-50 milliónir av sær til lokalsamfelagið. Tølini fyri samlaða umsetningin hjá Summar Festivalinum eru ikki almenn, heldur ikki í roknskapinum sum smápartafelagið, Summar Festivalurin, júst hevur latið inn.

Við heimild í ársroknskaparlógini paragraf 25,2 verður bert bruttoúrslitið víst í roknskapinum. Henda paragraffin sigur, at um mett verður at tað er til ampa fyri fyriøkuna at kappingarneytar fáa innlit í tølini áðrenn bruttoúrslitið, kunnu hesi haldast loynilig.

Og hetta hevur Summar Festivalurin gagnnýtt, og roknskapurin sigur tí einki um umsetningin og broytiliga kostnaðan.

### Ein hálv millión

Bruttoúrslitið hjá Summar Festivalinum er 693.500 krónur ella eitt sindur omanfyri eina hálva millión.

Roknskapurin vísir, at Summar Festivalurin einans hevur eitt lønt starvsfólk og fyri alt tíðarskeiðið, sum umfatar 18 mánaðar og tað vil siga tveir festivalar, fekk viðkomandi 186.247 krónur í løn. Hvørki stjórn ella nevnd fekk samband roknskapinum nakra løn.

Men hesi tøl vísa sum sagt bara ein lítlan part av øllum sannleikanum. Útreiðslurnar, sum kunnu dragast frá áðrenn bruttoúrslitið, kunnu eisini umfata lønir, og tí sigur einsamalla lønarútreiðslan í roknskapinum einki um, hvussu nógv fólk fáa løn frá Summar Festivalinum, og hvussu nógva løn tey fáa.

### Stabil fyritøka

Ársúrslitið fyri 2006/2007 var 336.078, sum varð flutt til í ár. Upprunaligi partapeningurin á 100.000 er tí í dag 436.078 krónur. Ognaruppgerðin vísur at likviditeturin, ella tøki peningurin, um árskiftið 2006-2007 var um eina hálva millión. Hetta er helvtin av samlaðu ognini.

Roknskaparkøn fólk siga við Sosialin, at hetta kann síggjast sum tekin um eina varna fyritøku, sum ikki bindur peningin í spekulatión. Og tað at fyritøkan velur at flyta yvirskotið til komandið árið er eisini tekin um eina fyritøku, sum ger íløgur í sína egnu framtíð. Her skal tó takast fyrivarni fyri, at vit ikki vita, hvussu stórur samlaði umsetningurin er, og hvat broytiligu umkostningarnir eru brúktir til.

### Yvirskot stóran týdning

Steintór Rasmussen, stjóri, ynskir ikki at gera viðmerkingar til metingarnar hjá Olivur Joensen, blaðstjóra, um samlaða umsetningin hjá festivalinum.

- Hatta eru nokk bara git frá hansara síðu, og tað er ringt at meta um, hvønn búskaparligan týdning festivalurin hevur fyri økið. Fyri okkum hevur tað størsta týdning, at festivalurin ber seg, sigur hann.

- Vit eru ikki øðrvísi enn aðrar vinnufyritøkur, og hava vit ikki yvirskot og likviditet fáa vit ikki arbeitt. Yvirskotið og tøki peningurin gevur okkum arbeiðsfrið og skapar álit hjá kreditorum, staðfestir Steintór Rasmussen, sum fyrr í vikuni undirskrivaði nýggjan samstarvssáttmála við Norðoya Sparikassa.

Annars hevur Steintór Rasmussen ikki hug at gera størvegis viðmerkingar til



Sp/f Summar Festivalur
700 Klaksvík

**Rakstrarroknskapur 01.07.2006 - 31.12.2007**

| Nota | | |
|---|---|---|
| | Bruttoúrslit | 693.500,14 |
| 1 | Starvsfólkakostnaður | 186.247,00 |
| 3 | Avskrivingar | 90.814,00 |
| | Úrslit áðrenn rentur | 416.439,14 |
| | Rentuútreiðslur | 6.595,99 |
| | Úrslit áðrenn óvanligar vinn./kostn. | 409.843,15 |
| | Óvanligar vinningar/kostnaður | 0,00 |
| | Úrslit áðrenn skatt | 409.843,15 |
| | Avsett til dómtan skatt | 8.173,00 |
| | Avsett til skatt | 65.592,00 |
| 2 | Ársins úrslit | 336.078,15 |



Sp/f Summar Festivalur
700 Klaksvík

**Fíggjarstøða pr. 31.12.2007**

Ogn

| Nota | | |
|---|---|---|
| | Støðisogn | |
| | Immateriell støðisogn íalt | 0,00 |
| | Materiel støðisogn | |
| 3 | Materiel støðisogn íalt | 363.257,62 |
| | Fíggjarlig støðisogn íalt | 0,00 |
| | Støðisogn íalt | 363.257,62 |
| | Ogn í umferð | |
| | Goymsla | 0,00 |
| | Áogn | 213.144,74 |
| | Virðisbrøv og kapitalpartar íalt | 0,00 |
| | Tøkur peningur | 505.324,75 |
| | Ogn í umferð íalt | 718.469,49 |
| | Ogn íalt | 1.081.727,11 |

*Roknskapurin hjá Summar Festivalinum avdúkar ikki nógv, men hann vísir eina fyritøku við yvirskoti og tøkum peningi*